


BERG MOTORS

Staravegur 1-3 · Postboks 1039 · 110 Tórshavn
Tel: 31 35 35 · info@bm.fo · www.bergmotors.fo

Børn krevja pláss. Tað er í sjálvum sær eingin nýggjheit. Men ofta kemur tað dátt við hjá nýggjum foreldrum, hvussu skjótt bilurin fyllist við leikum, barnasetrum og beriposum frá handilsmiðstøðini, so hann í veruleikanum er ov lítil.

Tá er tað gott at vita, at tað ber til at ogna sær ein bíligan bil við plássi til bæði børnini og alt tað heila.

Við Suzuki Liana fær barnafamiljan tann rúmligasta bilin í sínum klassa fyri einans kr. 174.990. Tá er ikki spart upp á nakað, bilurin hevur fjarstýrt sentrallás, el-rútar framman og aftan, hita í setrunum og í síðuspeglunum, og innbygt radio við fløguspælara við stilling frá rattinum.

Liana verður drivin av einum kvikum og væl uppløgdum 1.6 VVT motori við 16 ventilum og 107 hk.

Bilurin fæst eisini í GLX luksusútgávuni við t.d. klimaanleggi, 15" alufelgum og tokulyktum fyri einans kr. 184.990.

Tað er eingin orsøk til at spreinga økonomisku rammurnar fyri húsarhaldið, fyri tað um tørvur er á størri og meira praktiskum bili. Kom framvið til ein óbindandi royndartúr.

Suzuki Liana. Prísir úr einans kr. 174.990.

**Spar upp til 25% uppá Suzuki Liana í februar**

SUZUKI

**Her hevur tú ráð til ein ordiligan bil**




Av tí at okkara deildarleiðari á Økisdeildini í Streymoy er farin í annað starv, søkja vit eftir einum deildarleiðara.

Leiðarin hevur ábyrgd av leiðslu, ráðlegging og samskipan av økisdeildini. Leiðarin hevur ábyrgd av, at deildin er í støðugari menning, bæði hvat viðvíkur starvsfólkum og samskiftinum við brúkarar.

Starvið hevur fjølbroyttar avbjóðingar bæði innan umsiting av almannalóggávu og dagligari leiðslu av eini deild við 12 starvsfólkum. Deildin er í støðugari broyting og menning, og tískil hava umsøkjarar við leiðsluroyndum ein fyrimun.

Okkara ynski er, at tú hevur evni og áræði at seta í verk fyriskipanir. Somuleiðis, at tú evnar at eggja og menna starvsfólk. Herumframt, at tú hevur góð samstarvsevni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og kunnleika til KT.

Í starvinum sum leiðari verður tú partur av einum fjølbroyttum og livandi tvørfakligum umhvørvi, har samstarvað verður nógv við aðrar leiðarar og stovnar.

Tú verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingar í samfelagnum og taka við avbjóðingum, sum liggja í tíðini og framtíðini.

Vit sóknast eftir einum persóni, sum hevur útbúgving sum sosialráðgevi, ella sum hevur aðra samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni.

Starvið er sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á telefon 215480.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 19. februar 2009, kl. 12.00.

Vinarliga merkið brævbjálvan "Leiðari til Økisdeildina í Streymoy". Umsóknin skal sendast til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

KREA

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

almannastovan

Økisdeildin í Streymoy er portrið til Almannastovuna hjá brúkarum á Streymoynni, í Vágunum, á Sandoynni og smáu oyggjunum í miðøkinum. Uppgávan hjá økisdeildini er at veita sosiala ráðgeving og vegleiðing til einstaklingar. Upplýsa um rættindi, skyldur og hjálparmøguleikar sambært almannalóggávuna. Viðgera umsóknir um veitingar og hjálparfyriskipanir og umsita veitingar sambært forsorgarlógini og tørvstreytaðar veitingar sambært pensjónslógini, og annars móttaka og veita møguligan stuðul í sambandi við umsókn um aðrar almannaveitingar, sum deildin ikki sjálv umsitur.

Almannastovan virkar miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygd og virðing fyri einstaklinginum. Virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.